RUNAVÍKAR KOMMUNA

## Hvat er órudd og annað burturkast

Lóggávan og umhvørvisstovan vísa á, hvat verður mett at verða rudd og annað burturkast.

Náttúrufriðingarlógin hevur eitt generalt forboð móti dálking av óruddi, og sigur millum annað, at øll dálking av náttúruni við pappíri, fløskum, plastíløtum, brotum o.ø. er forboðin. Bilvrak, ymisk onnur akfør, maskinamboð og partar av teimum, ið ikki verður nýtt meira, mugu ikki kastast burtur á støð, har tey lýta skaða ella eru til skaða alla ampa fyri onnur.

Kunngerðin um burturkast sigur, at tað er ikki loyvt at tveita ella lata burturkast, harundir ónýtilig akfør, skipsvrøk, fiskaslógv, havhestafjøður v.m. liggja og rekast í haga, fjøru, á sjógvi, fram við vegi ella aðrastaðni.

Umhvørisstovan sigur á heimasíðuni, www.us.fo, at um lutir liggja á uttandurðaøki, ið ikki er rokna sum goymsla, og lutirnir ikki verða nýttir til endamálið teir eru gjørdir til, eru hesir at rokna sum burturkast. Sum til dømis bilvrak, gomul vinnutól, soknir bátar, niðurdottð hegn, leivdir av byggitilfari o.a..

Lógirnar eru tøkar fyri almenninginum á www.logir.fo og eita:

Løgtingslóg nr. 48 frá 9. Juli 1970 um náttúrufriðing, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 110 frá 29. Juni 1995

Løgtingslóg nr. 134 frá 29. Oktober 1988 um umhvørvisvernd, sum broytt við løgtingslóg nr. 128 frá 22. Desember 2008

Kunngerð nr. 53 frá 19. Mai 1994 um umhvørvisreglur, sum seinast broytt við kunngerð nr. 111 frá 7. September 2007

Kunngerð nr. 147 frá 19. Oktober 1995 um burturkast, sum broytt við kunngerð nr. 90 frá 28. September 2007